# Götu Kommuna

## Varaleiðari søkist til dagstovnin í Gøtu

Pedagogur søkist til at arbeiða sum varaleiðari á barnagarðsstovuni Látrinum.

Arbeiðstíðin er 30 tímar um vikuna á stovuni og 5 tímar um vikuna í samband við varaleiðarastarvið.

**Í dagliga arbeiðnum leggja vit m.a. stóran dent á:**

- at børn og starvsfólk trívast og eru í menning.
- at hava gott samstarv við foreldur og starvsfólk.
- at skapa álit og tryggleika, bæði fyri foreldur og børn.
- at virða tað einstaka barnið í bólkinum.

**Vit ynskja:**

- at tú hevur góð samstarvsevnir.
- at tú hevur hug og áðræði at skapa ein fjølbroyttan og tryggan gerðandisdag.
- at verða við til at mynda og menna tað pedagogiska umhvørvi.
- er í leiðarans staði, tá ið hesin er burturstaddur.
- er leiðaranum til hjálpar í leiðarastarvinum.

Dagstovnurin lat upp 1. februar 2000, og liggur í hugnaligum og barnavinarligum umhvørvi, við Gøtugjógv.

Um eingin pedagogur søkir, verður starvið fyribilssett við hjálparfólkið tíðaravmarkað til august 2007.

Lønin er sambært sáttmála ímillum Føroya Pedagogfelag og Føroya kommunala Arbeiðsgevarafelag

Nærri upplýsing um starvið fast við at venda sær til Torgerð Hansen leiðara, fartlf. 771008.

Skrivlig umsókn við avriti av prógvi og ummælum skal sendast okkum í seinasta lagi 25. feb. 2007 kl.10.00.

Bygdaráðið tekur sær rætt til frítt at velja ímillum umsóknirnar ella ongan at seta.

**Dagstovnurin í Gøtu**
Postboks 32
Vaktarhúsvegur 1.
511 Gøtugjógv



## Leys størv

### Deildarleiðari og fulltrúi/ráðgevi til nýggja løgdeild

Tórshavnar kommuna hevur sett løgdeild á stovn og søkir tí eftir leiðara og fulltrúa/ráðgeva til deildina.

**Uppgávur**
Løgdeildin skal í høvuðsheitum ráðgeva stjórn og nevndum, arbeiða við tvørfakligum lógaruppgávum, menna mannagongdir og fyrisitingarligan førleika og hjálpa til í truplum lógarmálum. Roknast má við nakað av tungari málsviðgerð.

Arbeiðsøkið fevnir um alt kommunalt virksemi. Tó fer deildin serliga at varða av kommunulóg og kommunustýrisskipan, skattakærufyrisiting, fyrisitingarrætti og privatrættarligum viðurskiftum.

Á deildini fara at starvast fýra fólk – ein deildarleiðari, ein málsviðgeri og tveir fulltrúar. Av tí at deildin er nýggj, eru møguleikar fyri at byggja upp eina vælvirkandi deild, har starvsfólkini fáa ávirkan á, hvussu deildin verður ment og skipað.

Tórshavnar kommuna bjóðar eitt spennandi og dynamiskt arbeiðspláss, við sjálvstøðugum, avbjóðandi og tvørfakligum uppgávum. Góðir møguleikar eru fyri fakligari og persónligari menning.

**Førleikakrøv**
Til annað starvið krevst løgfrøðiligt embætisprógv. Til hitt starvið krevst útbúgving, sum kann vera samansett av løgfrøði og búskapi á kandidat- ella bachelorstigi, til dømis cand.merc.jur ella cand.merc.aud. Ásett er ikki frammundan, hvørt deildarleiðarin ella fulltrúin/ráðgevin skal vera løgfrøðingur ella hava aðra útbúgving. Hetta veldst um, hvør settur verður. Umsøkjarar skulu tilskila, hvat starv, teir søkja.

Best er at hava viðkomandi royndir, helst í almennari fyrisiting, men hetta er eingin treyt. Umsøkjarar mugu duga væl at samskifta og samstarva bæði innanhýsis og uttanhýsis.

**Setan**
Størvini verða sett skjótast til ber og lønt sambært sáttmálanum millum BLF og FMR, tó kann deildarleiðarin velja tænastumannalíknandi setan eftir 37. lønarflokki. Starvið sum fulltrúi kann setast sum ráðgevi, um førleikar og royndir eru til tess. Vit bjóða eisini skeið og eftirútbúgving.

**Umsókn**
Hevur hetta tín áhuga, so send umsókn saman við viðmælum og prógvum til Tórshavnar kommunu, postboks 32, 110 Tórshavn. Umsóknin skal vera okkum í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 23. februar 2007 kl. 15.00. Ætlandi verða setanarsamrøður í viku 9.

**Meiri at vita?**
Vit kunnu greiða meiri frá størvunum, um tú ringir til Jens Marius Poulsen, kommunustjóra, ella Heðin Mortensen, borgarstjóra, tlf. 302010.

REPROZ

**Tórshavnar kommuna**

# Tórshavnar Bátafelag

Ársveitslan verður leygarkvøldið 10. mars kl. 19.30 í Róðrarneystinum á Argjum.

Atgongumerki kunnu keypast á Kunningarstovuni.

***Nevndin***

## RUKO LÁSATÆNASTA

Ruko

- Umleggja alt til sama lykil
- Vit kopiera lyklar
- Útvega allar lásakassar
- Útvega lásasystem



Vit eru serkønir á økinum

**VALDEMAR LÜTZEN BYGGIBÚÐ** • *TÍN BYGGIBÚÐ OG LÁSATÆNASTA*
SKÁLATRØÐ 14 • TÓRSHAVN • TEL 30 10 20

# Sving Rock´n Roll

## í Kagganum hvørt mikukvøld

**Nú byrjar nýtt dansiskeið í Rock´n roll í Kagganum, 4 mikukvøld á rað.**

**Vit byrja mikukvøldið 14. februar kl. 19.30 – 21.30.**

**Kostnaður 280,- kr**

**Øll eru vælkomin (støk og pør)**

**Tilmelding hjá Marilyn áðrenn 13. februar á tlf. 26 38 45**

***Kom og Dansa***